**10 TING** UM

# SOULSHOCK

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Stjørnurnar standa í kø hjá honum

HANN ER NÝGGJUR **DÓMARI** Í DONSKU X-FACTOR KAPPINGINI, SUM NÓGVIR FØROYINGAR EISINI FYLGJA. SEINASTU GÓÐ 15 ÁRINI HEVUR **CARSTEN SOULSHOCK** VIRKAÐ SUM **TÓNLEIKAFRAMLEIÐARI** Í USA.

1 Soulshock, sum er 40 ára gamal, er ættaður úr Gug nærindis Aalborg

2 Hann hevur búð í Los Angeles í USA síðani 1993.

3 Soulshock tók av fyrstan tíð útbúgving í klædnahandli, men áhugin fyri at venda plátum og mixa var størri enn at selja kovboybuskur og t-troyggjur.

4 **Sum tannáringur vandi hann upp í átta tímar um dagin at skratja á sínum plátuspælara.**

5 Í 1989 kom ferð á yrkisleið hansara, tá ið hann endaði sum nummar trý í stóru DMC Mixin Championship í London. Eftir hetta slapp hann sum DJ við á europeiska konsertferð hjá Queen Latifah, Jungle Brothers og Chill Rob G.

6 Millum nøvnini, sum Soulshock hevur arbeitt saman við, eru Backstreet Boys, Cheryl Cole, 2Pac, Toni Braxton, Whitney Houston og Craig David.

7 Soulshock er giftur við Maxena Maxwell úr bólkinum Brownstone, og tey eiga ein fýra ára gamlan son.

8 Soulshock er vínsamlari, og hann eigur umleið 1000 vínfløskur í sínum savni

9 Hóast hann býr í USA, heldur hann jól í heimbýnum Gug í jútlandi í Danmark

10 **– Málið við X Factor er heilt einfalt at skapa eina nýggja tónleikastjørnu, og ta uppgávuna taki eg alvorligt, sigur Soulshock.**

## SITAT



Pengar eru ikki einasta svarið – men teir gera mun.

***Barrack Obama***

*amerikanskur forseti*

## MIÐLARNIR OG EG

Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



RITHØVUNDIN **RAKEL HELMSDAL** SAKNAR FRANSKT ÚTVARP OG ELSKAR WIKIPEDIA.

**MÍTT BLAÐ**
Eg lesi ikki ofta tey vanligu bløðini, 4. hvørja viku, tá eg eri til arbeiðis á Jarðfeingi, lesi eg tey tó ígjøgnum. Vit arva Weekendavisen, so hana lesi eg eitt sindur í av og á, men kundi hugsa mær at lisið meira í henni.




**MÍN HEIMASÍÐA**
Eg nýti internetið NÓGV, kanska í so nógv, latið meg fanga av, at har er so nógv spennandi at lesa og síggja. Eg elski Wikipedia, men annars havi eg ov nógvar slóðir til at kunna nevna annað enn tær síðurnar eg nýti nógva tíð uppá, nevniliga tær eg sjálv umsiti.

**MÍN TÓNLEIKUR**
Til gerandis lurti eg ikki nógv eftir tónleiki, men tá tað er, so er tað mest klassiskur tónleikur, Ravel, Satie, Elgar, Tchaikovsky, Sibelius, Prokofiev v.fl. Annars lurti eg eftir Tom Waits, Bjørk, gomul jazzi, fólkatónleiki, world music. Men best dámar mær at hoyra allan tónleik live; bakgrundstónleikur er bara ikki eg.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Eg nýti helst alt ov nógv tíð á Facebook, men tað er ikki bara spilt tíð. Eg brúki tað sera nógv til at fá informatiónir runt. Eisini er tað ein fantastiskur møguleiki at halda samband við familju, sum býr langt burturi og man ikki sær ofta. Brádliga eru vit ikki sum fremmandafólk, hóast vit ikki hevur sæst í fleiri ár.

**MÍN DVD**
Eg elski filmar, og hóast eg haldi »at film skal ses i biografen«, so ber hetta jú ikki til í Føroyum. Bert eitt fátal av góðum filmunum koma higar. So eg havi nógvar dvd-filmar. Mínir yndis eru filmarnir hjá Tim Burton, Jean-Pierre Jeunet og Akira Kurosawa. Mær dámar sera væl franskar filmar, og evropeiskar filmar sum heild, og fantasy og sci-fi-filmar.




**MÍTT MAGASIN**
Eg lesi bæði Samvirke og Dunnublaðið á tamb!

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Hyggi satt at siga næstan onki sjónvarp, men onkrar sjónvarpsrøðir síggi eg á dvd: X-files, Tales of the Unexpected og Midsomer Murders.

**MÍN BÓK**
Her er ikki pláss at nevna bara ein brotpart av teimum bókunum, sum gera mun hjá mær, so eg kann bara nevna tær bøkur ella høvundar, sum eg altíð vendi aftur til: »Death is a lonely buisness« hjá Ray Bradbury og annars tað mesta, hann hevur skrivað. Stuttsøgan »Uventet bekendskab med et håndværk« eftir Stefan Zweig og annars absolutt alt hann skrivaði, bøkurnar hjá Tove Janson, J.R.R. Tolkien, Ursulu LeGuin og Edgar Allan Poe og … og …

**MÍTT ÚTVARP**
Eri ikki tann stóri útvarpslurtarin, men siti ofta enn og eri melankolsk um ikki at hoyra franskt útvarp, France Culture, France Inter ella France Music, har tað ber til at hoyra útvarp, sum ger teg klókari 24 tímar um samdøgri.

**MÍN TELEFON**
Kann ikki vera fyriuttan, men eg hati, at hon ringir, tá eg standi við kassan í FK og skal gjalda.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Pop-tónleik í útvarpinum og idiotiskar undirhaldssendingar og tollutar amerikanskar seriur í sjónvarpinum.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Nógv!! At tað mesta er so grunt, at áhugaverd ting sjáldan verða fylgd upp. At mentan hevur so ómetaliga lítið pláss í flestu miðlunum, at ítróttur skal fáa so órímiliga nógv pláss í øllum miðlum. Og tað irriterar meg ómetaligt, at tað letur til, at flestu tíðindafólk halda, at vit helst vilja hava ein óendaligan streym at tíðindum um tað sama, t.d. ómetaligar nøgdir av óneyðugum tíðindum um svínakrím.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Mentanarsendingar, tí mentan er fyri okkum øll, ikki bara fyri tey fáu útvaldu, sum tað letur til at nógv halda. Fleiri áhugaverd tíðindi um mentanartiltøk sum eru í landinum og uttanfyri landoddarnar.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos